# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Nú eri eg ein ómetaliga glaður maður*

*Jóhan Petur á Stongum, SÍ*

# Gull og silvur til Bjørk H. Olsen

**Bert fimm hundraðpartar av einum sekundi manglaðu í at vinna tvær DM-gull**

RENNING
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Bjørk Herup Olsen úr Havn hevur veruliga sligið navn sítt fast í Danmark. Innandura Danmarksmeistaraskapið í frælsum ítrótti var hildið í tí nýggju innandura høllini, sum liggur í Skive í Vestur-Jútlandi. Bjørk var meldað til bólkin, Gentur 16-17 ár, og sigast má, at tað gekk framúr væl.

### Gull á 3.000 metrum

Leygardagin rann Bjørk í finaluni á 3.000 metra-teininum, og her gjørdi gentan úr Bragdinum eitt veruligt bragd. Hon brúkti 10.22,57 minuttir uppá teir 3.000 metrarnar, og var tað nóg mikið til at vinna gull. Bjørk rann taktiskt klókt. Var ikki í fremstu røð í byrjanini, men át seg so spakuliga inn á førarafeltið, og ímóti endanum hevði hon lagt seg á odda í feltinum. Fyrst komin á fremsta plássið slepti Bjørk ikki endanum, og rann seg til tað stóru gullmedaljuna. Silvurvinnarin Marie Munk Jacobsen úr Aarhus 1900 var meir enn fimm sekund aftanfyri Bjørk. Tíðin hjá henni var 10.27,68. Eitt langt lop var niður til bronsuvinnaran Cecilie H. Christensen úr Ballerup AK, hon hevði tíðina 11.07,81.




*Framgongdin hevur verið stór hjá Bjørk Herup Olsen, og heiðursmerkini í Danmark boða frá, at Føroyar veruliga hava ein nýggjan eliturennara ávegis*

### Silvur á 1.500 metrum

Sunnudagin eydnaðist tað tó Marie Munk Jacobsen at fáa býtt um uppá leiklutirnar. Tá var finalan á 1.500 metra teininum. Marie Munk Jacobsen kláraði akkurát at spleysa Bjørk av við 5 hundraðpørtum av einum sekundi. Vinnaratíðin gjørdist 4.59,23 minuttir. Bjørk vann silvur við bara 5 hundraðpørtum av einum sekundi aftanfyri Mariu Munk Jacobsen. So nær, so nær. Fimm hundraðpartar er ikki nógv, men í eliturenning ógvuliga avgerandi. Ergiligt, men vit mugu øll kortini lyfta hattin av fyri Bjørk Herup Olsen, sum vit uttan iva fara at hoyra nógv til. Bæði til FM, DM, Oyggjaleikir, og vónandi onkra størri millumtjóða kapping. Tí her er talan um eitt veruligt talent. Sosialurin ynskir Bjørk tillukku við gullinum og silvurinum.

# Kunna um Ítróttarbreytina í Havn

**Mikudagin hevur Handilsskúlin á Kambsdali kunnandi fund um serligu Ítróttarbreytina, har tað næsta skúlaár ber til at fáa venjing í bæði fótbólti og svimjing. Fundurin verður í FSF-húsinum í Havn**

ÍTRÓTTARSKÚLI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Í fjør var ítróttarflokkurin á Kambsdali í Danmark á venjingarlegu*

Í hesum skúlaárinum hevur Handilsskúlin á Kambsdali havt eina serliga Ítróttarbreyt, har ungir fótbóltsspælarar hava kunnað samantvinnað miðnámsútbúgving og eyka fótbóltsvenjing.

Royndirnar av Ítróttarbreytini eru so góðar, at Handilsskúlin á Kambsdali eisini næsta skúlaár fer at bjóða ungfólki hendan møguleikan. Harafturat verður Ítróttarbreytin víðkað til eisini at umfata svimjing í 2008/09.

Mikudagin verður skipað fyri kunningarfundi um ítróttarbreytina, og umboð frá skúlanum, lestrarvegleiðari, venjarar og næmingar eru til staðar.

Kunnandi fundurin verður í FSF-húsinum í Havn mikudagin 20. februar klokkan 18.00.

Á fundinum verður kunnað um útbúgvingina, um venjingarnar, og møguleiki verður eisini at seta lærarum spurningar og tosa við næmingar á breytini.

